# ÚTLOND

SAMBAND
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

*– Løgreglan í JFK-floghavnini vildi hava meg úr klæðunum og hótti meg*

*venesuelski uttanríkisráðharrin*

**STUTT SAGT**

## Góðtaka ikki umbering

Stjórnin í Venesuela er í øðinium, at landsins uttanríkisráðharri bleiv hildin aftur í hálvan annan tíma í JFK-floghavnini í New York, tá hann skuldi til hús eftir at hava tikið lut á aðalfundinum hjá ST. Sjálvur hevur ráðharrin sagt, at løgreglumenninir vildu hava hann at lata seg úr, og at teir høvdu við at sláa, um hann ikki gjørdi eftir boðunum. Slíkt er greitt brot á galdandi reglur.

Amerikanskir embætismenn hava viðgingið, at løgreglumenninir gjørdu eitt mistak, og amerikanska umsitingin hevur eisini biðið Nicolas Madure, uttanríkisráðharra og stjórnina í Venesuela um umbering, sigur BBC. Men venesuelska stjórnin vil ikki góðtaka umberingina úr Washington.

Viðurskiftini millum USA og Venesuela eru ikki tey bestu, og tey batnaðu ikki, nú ST helt aðalfund. Har nýtti venesuelski forsetin, Hugo Chavéz, høvi til at finnast harðliga at George W. Bush, forseta. Hann samanbar Bush við hin versta og kallaði hann drykkjumann.

## Rindaðu fyri yvirgangsmenn



*Pervez Musharaf.*

Pakistanski forsetin, Pervez Musharaf, skrivar í sínum endurminningum, at USA rindaði Pakistan fleiri milliónir dollarar, aftur fyri at Pakistan gekk við til at útflýggja yvirgangsmenn til USA. Talan var um fólk, sum sambært amerikanarunum høvdu tilknýti til al-Qaeda, men forsetin skrivar ikki, hvussu nógvar pengar tað snúði seg um.

Sambært amerikanskari lóg kann USA ikki rinda einum landi ella tess myndugleikum slíka samsýning, tí lógin sigur, at bara einstaklingar kunnu fáa samsýning av hesum slagnum. Løgmálaráðið í Washington sigur, at har vita tey einki um, at USA hevur goldið nakað endurgjald fyri at fáa yvirgangsmenn úr Pakistan.

Í síðstu viku avdúkaði Pervez Musharaf, at fyrrverandi amerikanski varauttanríkisráðharrin, Richard Armitage, hevði hótt við, at USA fót at bumba Pakistan aftur í steinøldina, um landið ikki hjálpti USA í bardaganum ímóti yvirgangi. Hóttanin kom stutt eftir atsóknina 11. september í 200l.

## Útlendsk bløð bannað

Í Egyptalandi hava myndugleikarnir sett blaðsølum og øðrum forboð fyri at selja trý útlendsk bløð, tí tey hava skrivað niðursetandi um islamsku trúnna.

Talan er um tríggjar einstakar útgávur. Tað eru franska blaðið Le Figaro frá 19. september, týska Frankfurter Allgemeine Zeitung frá 16. september og ein útgáva av enska vikublaðnum Guardian Weekly. Sambært kunningarmálaráðharranum eru tær tríggjar útgávurnar steðgaðar, tí har standur, at tann muslimska trúgvin menti seg ígjøgnum harðskap og ágang.

Bannið hevur samband við tað, sum Benedikt 16. pávi segði í einari røðu í Týsklandi tann 12. september. Har endurgav hann nøkur orð frá 14. øld, sum vildu vera við, at læran hjá Muhammed profeti var ónd og ómenniskjalig. Orðini fingu øði í nógvar muslimar, og pávin noyddist at biðja um umbering fyri at hava endurgivið orðini.

# Thaksin hevði 114 kuffert við sær úr Teilandi

**Tað er líkt til, at teilendski forsætisráðharrin væntaði kvett ímóti sær, og tí tók hann tað mesta av ognum sínum við sær av landinum.**

TEILAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Thaksin Shinawatra hevur verið í London, síðani hann bleiv koyrdur frá.*

Visti teilendski frorsætisráðharrin, Thaksin Shinawatra, at herurin fyrireikaði kvett ímóti sær, tá hann fór til USA á aðalfund hjá ST?

Herleiðslan hevur ikki dult fyri, at hon gjørdi av at taka valdið, tí hon var misnøgd við politikkin hjá forsæstisráðharranum. Millum annað varð hann lagdur undir at hava hugsað meiri um seg og síni enn um teilendska fólkið.

Thaksin var staddur á ST-aðalfundi í New York, tá herurin tók valdið, men okkurt bendir á, at hann visti, hvat fór at henda, meðan hann var burturstaddur. Í hvussu er er komið fram, at forsætisráðharrin hevði ikki færri enn 58 kuffert við sær í flogfarinum, tá hann fór úr Teilandi til USA tann 9. september, og at eitt flogfar fór úr Teilandi fáar dagar undan kvettinum við 56 kuffertum hjá forsætisráðharranum.

Eygleiðarar í Bangkok halda, at forsætisráðharrin fekk ein stóran part av ognum sínum av landinum, áðrenn hann bleiv koyrdur frá. Hernaðarstýrið, sum nú stýrir Teilandi, vil ikki gera viðmerkingar til tíðindini, skrivar AP.

# Óhugnalig morð skelka USA

**Í síðstu viku varð ein kvinna funnin myrd í býnum St. Louis. Kvinnan var við barn, men drápsmaðurin hevði tikið barnið úr henni. Leygardagin vórðu trý onnur børn hjá kvinnuni funnin myrd.**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hósdagin varð tann 23 ára gamla Jimella Tunstall funnin myrd. Hon var við barn og var komin í sjeynda mánað, men drápsmaðurin hevði tikið barnið úr henni.

Løgreglan sendi stór lið at leita eftir barninum og hinum børnunum hjá kvinnuni, og leygardagin vórðu hini trý børnini funnin myrd. Løgreglan í St. Louis sigur, at tey lógu í einari vaskimaskinu og einari turkitrumlu, men hon vil ikki siga, hvussu tey doyðu.

Løgreglan í St. Louis hevur illgruna um, at ein 24 ára gomul vinkona Jimellu Tunstall hevur myrt hana og børnini. Tað er komið fram, at vinkonan var saman við teimum trimum børnunum seinasta mánadag, og tað er eisini komið fram, at hon skipaði fyri, at ein smábarn bleiv jarðað í síðstu viku. Sjálv vildi hon vera við, at hon hevði fingið eitt deyðføtt barn, men løgreglan vónar, at DNA-kanningar kunnu prógva, at talan var um tað ófødda barnið hjá Jimellu Tunstall.

Tann 24 ára gamla kvinnan skuldi koma fyri rættin í dag, og hon kann fáa deyðarevsing, verður hon funnin sek. Sjálv eigur hon tvey børn, sum nú eru í varðveitslu hjá myndugleikunum.

Morðini í East St. Louis hava skelkað amerikanarar, men tilburðurin er kortini ikki tann einasti av slíkum slagi, skrivar AP. Í síðstu viku varð ein kvinna álopin í Missouri, og drápsmaðurin tók pinkubarn hennara við sær. Her eydnaðist tað løgregluni at finna drápsmannin og barnið, og mamman slapp eisini við lívinum, skrivar AP.